## UTTAN ÚR HEIMI



*Lynndie England á veg úr dómhúsinum í Fort Wood í Texas, eftir at hon hevði fingið dómin*

*Mynd: Reuters*

# Fekk trý ára fongsul

**Tann 22 ára gamla Lynndie England fekk trý ára fongsul fyri at hava farið illa við fangum í Irak**

DÓMUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Lynndie England græt, tá hon fekk dómin, tí tey næstu trý árini skal hon sita í fongsli. Samstundis hevur hon fingið at vita, at hon sleppur ikki at arbeiða í amerikanska herinum aftur. Revsingin kundi verið harðari, tí eftir reglunum kundi hon fáa upp í níggju ára fongsul.

Lynndie England gjørdist kend, tá fjølmiðlarnir kunngjørdu myndir úr Abu Ghraib-fongslinum í Bagdad. Myndirnar, sum vórðu tiknar á heysti í 2003, vístu amerikanskar hermenn fara illa við irakskum fangum. Lynndie England var á fleiri myndum. Á einari mynd lá hon brosandi oman á fleiri naknum irakskum fangum, sum vóru laðaðir oman á hvør annan sum ein varði. Á einari aðrari mynd stóð hon við einum naknum irakskum fanga í tjóðri.

Myndirnar skakaðu heimin, og kravt varð, at tey seku blivu revsað. Amerikanska herleiðslan gjørdi av at draga fleiri hermenn og fangavørðar fyri hernaðardómstólar, og nakrir eru dømdir. Nú er Lynndie England ein.

Nógvir amerikanarar halda, at fleiri longri uppi í herleiðsluni og kanska verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, mundu vita, hvat fór fram í Abu Ghraib-fongslinum, men enn er eingin týðandi heryvirmaður ella politikari dømdur í málinum.

# Blair skal kunngera nær hann fer frá

**Tað var eingin ivi á landsfundinum hjá bretska arbeiðaraflokkinum. Labour skal vinna næsta valið eisini - uttan Tony Blair við róðrið**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Vit máttu nútímansgera flokkin fyri at vinna valið í 1997, men tann nýggja øldin krevur, at vit gera tað sama nú. Ein skilagóður politikkur tey næstu árini og okkara virði skulu útvega okkum enn ein sigur á næsta vali, segði Tony Blair á landsfundinum í Brighton.

Í røðuni umrøddi hann ymisk politisk viðurskifti so sum búskaparmál, heilsumál og skúlamál, men hann segði ikki eitt orð um, nær hann fer frá.

Tað hevur leingi verið greitt, at Blair ætlar sær frá sum forsætisráðharri í hesum valskeiðinum, men summir eygleiðarar í Brighton halda, at røða hansara har gav ábendingar um, at hann ætlar sær at verða verandi í Downing Street alt valskeiðið. Tað ru eisini tey, sum vilja hava hann at verða sitandi. Eitt nú hava Charles Clarke,



*Tony Blair segði einki um, nær hann ætlar sær úr Downing Street.*

innanríkisráðharri, og Peter Hain, ráðharri í norðurírskum málum, sagt seg vóna, at Blair situr til næsta val.

Men onnur halda, at hann eigur at fara frá í góðari tíð. Teirra millum eru viðhaldsfólk hjá Gordon Brown, fíggjarmálaráðharra, sum hava hug at leggja Blair undir at tvíhalda um stjórnarleiðarasessin. Tey halda, at Blair eigur at lata Brown taka við í 2007, so hann fær góða tíð til at fyrireika seg og flokkin til næsta val, sum verður í 2009 ella 2010.

Í gjár kom undan kavi, at næstformaðurin í Labour, John Prescott, vil hava Blair at siga, nær hann ætlar sær frá, men eygleiðarar í Brighton halda, at forsætisráðharrin fer ikki at kunngera dagin fyrr enn í fyrsta lagi á landsfundinum hjá flokkinum næsta ár.

## Skúlagongdin ov stutt

Danska lærarafelagið heldur, at tað tekur ov stutta tíð at læra til lærara. Sum er er útbúgvingartíðin fýra ár, men lærarafelagið heldur, at hon eigur at vera fimm ár.

Harafturat vil felagið hava myndugleikarnar at broyta læraraútbúgvingina, so hon verður á hædd við útbúgvingar á teimum lærdu háskúlunum, tó soleiðis at fólk framvegis skulu fáa sína útbúgving á teimum vanligu læraraskúlunum. Hetta er ein skipan, ið líkist teirri finsku.

Danska læraraútbúgvingin bleiv endurskoðað tvær ferðir í nítiárunum, og ætlandi koma politikararnir við enn einari broyting longu í ár. Formaðurin í lærarafelagnum, Anders Bonde Christensen, sigur, at hesaferð eiga myndugleikarnir at finna eina varandi skipan. Hann vil eisini hava politikararnar at tryggja tær fíggjarligu umstøðurnar hjá læraraskúlunum, nú tað ljóðar, at summir skúlar umhugsa at strika ein part av frálæruni, tí teir hava ikki nóg mikið av pengum.

## Aldarinnar byggiverk

Í sambandi við at hundrað ár eru liðin, síðani Noreg tók loysing frá Svøríki, hevur norska byggivinnan kosið tað mest hugtakandi byggiverkið, sum er bygt hesa seinastu øldina.

Valið fall á Atlantshavsvegin í Møre og Romsdal. Vegurin bindur fleiri oyggjar saman og er tí á ein hátt ein vegur út í Atlantshavið. Vegurin varð tikin í nýtslu í 1989 og er í nógvar mátar eitt rættiliga sjáldsamt byggiverk at síggja.

14 onnur byggiverk vóru við í kappingini. Teirra millum vóru ráðhúsið í Oslo, Íshavskirkjan í Tromsø, brýrnar um Svinesund við svenska markið og leikhúsið í Drammen.

## Dýrt at seta búgv

Ein kanning av húsaprísunum í teimum evropeisku høvuðsstøðunum vísir, at tað er serliga dýrt at seta føtur undir egið borð, um tú ætlar tær at búgva í Luksenburg. Har kosta eini hús ella ein íbúð 2,5 milliónir krónur í meðal.

Tann næstdýrasti býurin er Bern í Sveis, har meðalprísurin er oman fyri tvær milliónir krónur, og hann er bara eitt vet lægri í Madrid. Men vilt tú ikki rinda so nógv fyri ein bústað, kanst tú velja at búseta teg í Bruxelles. Har kostar tað í meðal eina millión krónur, og ert tú førur fyri at rinda eitt lítið sindur meiri enn tað, kanst tú flyta til Athen.

Kanningin vísir annars, at 65,2 prosent av evropearunum búgva í egnum bústaði, og at tað er vorðið alt meiri vanligt, at fólk eiga tað, sum tey búgva í. Men viðurskiftini eru sera ymisk í teimum ymsu londunum. Í Spania eiga 87 prosent tað, tey búgva í, men í Sveis eru tað bara 36,5 prosent, sum eiga húsini ella íbúðina, sum tey búgva í.

## Í klæðum úr Kina

Hyggur tú inn í eitt klædnaskáp í Danmark, kanst tú vera rættiliga vísur í, at ein rættiliga fittur partur av pløggunum hava sín uppruna á einari seymistovu í Kina. Tað eru serliga jakkar, troyggjur og skjúrtur, sum hava merkiseðilin "Made in China" undir kraganum.

Hagtøl hjá donsku hagstovuni vísa, at sjey teir fyrstu mánaðarnar í ár keyptu danir kinesisk klæðir fyri tríggjar milliardir krónur. Tað er heili 37 prosent meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør, og sostatt er umleið ein triðingur av teimum útlendsku klæðunum úr Kina, skrivar Politiken. Men hagtølini vísa eisini, at eitt nú keypa danir fýra ferðir so nógvar kinesiskar troyggjur nú enn fyrr.

Men danir keypa ikki bara kinesisk klæðir. Næst eftir Kina er tað Turkaland, sum sendir nógv klæðir til Danmarkar, men innflutningurin úr Kina er tvær ferðir so stórur.